


»Jomfru Ane gade í Ålborg«

# Ålborg – eitt lítið norðurlendskt París

Millum manna verður Ålborg umrøddur sum eitt lítið norðurlendskt París. Gjøgnum alt árið er nógv ymisk og spennandi mentanartilboð, sum tann ferðandi kann fara til í Ålborg

Millum tær spennandi farleiðirnar hjá Atlantsflogi er Ålborg, sum er tað fíggjarliga og mentanarliga knútapunktið í Norður-Jútlandi. Ålborg er ein gamla býur, sum hevur eina søgu, sum gongur heilt aftur til víkingaøldina. Nógv virksemi er í býnum, bæði í dag- og í náttartímunum, og býurin hevur eisini nakrar ógvuliga spennandi festivalar.

Karnival og víkingamarknaður

Í mai á hvørjum ári verður karnival hildið í Ålborg. Karnivalið er tað størsta av sínum slagi í øllum Norður-Evropa, og luttakarnir koma frá mongum ymiskum londum, og seta hesir veruliga lit á býin. Størsta víkingagravstaðið í Ålborg eitur Lindholm Høje. Seinast í juni, ella fyrst í juli á hvørjum ári, verður skipað fyri einum víkingamarknaði og einum víkingaspæli á Lindholm Høje. Á víkingamarknaðinum kann ein finna fólk, sum leika víkingar, og sýna fram lutir og ymiskt handverk.

Djóragarður og Tivoliland

Eitt stað, sum barnafamiljurnar eiga at vitja er djóragarðurin í Ålborg – Aalborg Zoo. Djóragarðurin í Ålborg hevur 1.300 spennandi djór ein kann síggja. Talan er um heili 138 ymisk djórasløg. Talan er um djór frá øllum heiminum, teirra millum eisini hótt djórasløg. Ein túrur í djóragarðinum er ein stuttligur og minningarríkur túrur fyri alla familjuna. Ålborg hevur eisini egið Tivoli – Tivoliland – sum hevur 60 ár á baki, og har er nógv ymiskt spennandi fólk kunnu royna.

”Horrible Ålborg”

Millum forkunnugu upplivingarnar í Ålborg eru tiltøkini, sum tann lokali sjónleikarabólkurin ”Det Hem´lige Teater” reikar fyri. ”Det Hem´lige Teater” bjóðar søguligar túrar, sum ganga 400 ár aftur í tíðina, tá Ålborg var eitt rættiliga ótrygt stað at ferðast í. Sjónleikarnir eru ógvuliga ógvusligir, tá tey geva seg út í leiklutinum, sum brotsfólk úr 17. øld, og skal ein vænta at gerast kløkkur á vegnum, tá hesi koma undan húsahornunum.

Matstovur og handlar

Matstovur tróta ikki í Ålborg. Tað eru yvir 300 matstovur ein kann vitja í Ålborg, har ein kann fáa allan mat frá donskum hakkibúffi til altjóða gourmetmat. Kring býin eru biografar, sjónleikarahús og konserthallir. Jomfru Ane Gade er staðið fyri náttarravnarnar. Har finnast vertshús, náttklubbar, diskotek og matstovur lið um lið. Handilsmøguleikarnir eru eisini góðir í Ålborg. Størsti handilsmiðdepulin er Aalborg Storcenter, sum hevur 65 ymiskar handlar. Í miðbýnum í Ålborg eru miðini Bispensgade og Algade, sum hava nógvar ymiskar serhandlar og smærri handilsmiðdeplar.